# TILTØK

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími og Bønarløta. Páll Poulsen talar frá Opinberingini.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 Møti við kvartettini úr Betesda í Klaksvík. Millum møtini verður drekkamuður.
Mánadagin verður Ungdómstiltak fyri ung í aldrinum 5.-10. flokk. www.hebron.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/ Jógvan Steintún, evnið: Hirðar, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Frá Ebenezer**
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði fyri børn 9 ár og eldri, kl. 19.30 Sangvenjing – Ebenezerkórið, kl. 21 Sangvenjing – ungdómskórið.
Mikudagin kl. 16.45 Sangvenjing – yngra barnakórið, kl. 17.30 AWANA fyribørn í 1.-4. flokk, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti – dópur verður.
Hósdagin kl. 10 Fyrrapartsløta fyri eldri menn í Sloans húsi, kl. 17 Sangvenjiing eldra barnakórið, kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 20 Teen-Night.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið fyri allar kvinnur.
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19 Delli.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Evu Andresen, evnið er »Mission«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Samuel Dunya, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC. Evnið: »At liva í kærleika«. 1. partur v/ Liljan Jacobsen, kl. 16.00 Samkomufundur.
Mánadagin kl. 20 Breakthrough worship og bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Heimasíða: www.katolsk.fo

**Meinigheitshúsið**
Mikudagin kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 19.30-21.30 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Regin Høgnesen, Meinigheitskórið syngur.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið møtir. Hetta er fyri ungdómin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Missiónsvikan heldur áfram mikudagin 12. januar við møti kl. 20 við Regin Høgnesen og sangbólkurin Gittit syngur.
Hósdagin 13. januar er møti kl. 20 við Mogens T. Christensen og Jónhilda og Gulakur Hansen syngja. 1/2 tíma undan hvørjum møti er bønarhald.

**Saron, Vestmanna**
Hóskvøldið kl. 19 byrjar Frítíðararbeiðið aftur.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Breyðbróting.
Mánakvøldið kl. 20 Opið hús fyri ung. Verið hjartaliga vælkomin.

**Miðvágs missiónshús**
Mikudagin kl. 19.30 kvinnumøti.
Leygardagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 føðingardagsmøti (Missiónshúsið fyllur 70 ár) við luttøku av Bergur Debes Joensen og Øssur Kjølbro. Barnaansing fyri smærru børnini. Innsavnan til húsið. Aftaná er felagsnátturði.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Møti við Edith og Niels Peder Johannesen verða leygardagin kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Evnið er grøðing og frían. Sunnudagsskúlin er sunnudagin kl. 14.30. Hjartaliga vælkomin.

**Haldórsvík**
Í kvøld kl. 20 verður Bíbliuundirvísing og bøn hjá Kirstin og Eirik Samuelsen. Verið hjartaliga vælkomin á møti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 AWAKE, við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Maibritt Frederiksberg, Barnamøti kl. 17. Vælkomin í kelduna. www.keldan.fo

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30, Terji á Lakjuni talar. Evnið: Næstakærleiki. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Glyvrum**
Bygdarlegan verður 28.-30. jan. Tekning á tlf. 448333 og 448968. Seinasta freist er 18. januar.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria, leygarkvøldið 15. januar kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Betesda – Norðoyggjar**
Mikukvøldið kl. 20 tala Monica og Tim Sharp, trúboðarar á Filipsoyggjunum.

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 19 Jólafestin fyri vaksin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, sunnudagsskúlakortini verða innheintaði, kl. 17.30 bøn- og lovsangsløta, kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti. Streingjakórið syngur. Magnus Jensen talar. Øll eru vælkomin.

**Betania í Porkeri**
Evangelisk fundarrøð undir heitinum: »Kristus frelsir til fulnar« byrjar í Betania tórskvøldið kl. 20. Svenning av Lofti, Páll á Lakjuni og Sámal á Toftini luttaka.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 10. januar*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 13 Undirvísing av seymimaskinum. Fakfólk frá Marjun Heimá
kl. 14-17 Kortspæl, telving og onnur spøl.
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen. Tilm. til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
*Týsdagin 11. januar*
kl. 10.-11.30 Sangur. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Hugnaløta
*Mikudagin 12. januar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. tlf. 316491
kl. 15 Túrur
*Hósdagin 13. januar*
kl. 10.00–10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Eingilsk talumál, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 14. januar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou, Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólíkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mikudagin 12. januar*
Vit hava opið hús frá kl. 14-16, har øll hava møguleika at koma at síggja okkara nýggju hølir. Ábit verður eisini at fáa.

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 10. januar*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
*Týsdagin 11. januar*
Boccia
*Mikudagin 12. januar*
Afturhvarv í práti og sangi
*Hósdagin 13. januar*
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte
*Fríggjadagin 14. januar*
Opið Hús

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Føroyskir Mærsk Siglarar**
*Postboks 11, 490 Strendur*
Frítíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S. Meira fæst at vita, við at venda sær til felagið á tlf. 590100 ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16 til 18.
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur: lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo